# ítróttur

Nr. 109 • fríggjadagur • 11. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Malta skal venda gongdini



*Aftur hendan mánaðin eru Føroyar farnar skeiva vegin á FIFA-styrkislistanum*

**Føroyska landsliðið er enn eina ferð dottið nøkur pláss eftir hæli á FIFA styrkislistanum, har eisini Ísland er á veg skeiva vegin**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Føroyar viga lítið hjá teimum, sum seta altjóða styrkislistan saman. Tað sást á listanum, sum varð kunngjørdur í fyrradagin. Føroyar eru dotnar trý pláss eftir hæli í ein mánað. Tá ið listin fyri mai varð kunngjørdur, vóru Føroyar á 131. plássinum. Nú verður roknað við, at tað eru 133 landslið, sum eru betri enn tað føroyska. Afturgongdin hevur verið støðug síðstu mánaðirnar. Í desember vóru Føroyar átta pláss hægri á listanum, enn tær nú eru.

Tá ið Føroyar vóru hægst á listanum fyri nøkrum árum síðani, var talan um eina støðu á umleið 110. plássinum.

Hvussu nógv fynd er í styrkislistanum hjá FIFA fæst at síggja, tá ið Føroyar 18. august fara at spæla á heimavølli ímóti Malta. Mótstøðuliðið mitt í juli er á styrkislistanum trý pláss omanfyri Føroyar. Malta er farið tvey pláss niður á listanum henda síðsta mánaðin.

Føroyar og Malta spældu tvær ferðir ímóti hvørjum øðrum í 1997. Bæði í Vaduz og á Toftum vunnu Føroyar 2–1. Í báðum førunum var Todi Jónsson annar føroyski málskjúttin. Um alt gongur, sum tað verður vónað, at tað skal gera, so verður Todi í føroyska álopinum 18. august.

### Vigaðu lítið

Síðsta ferðin, at Føroyar vóru í altjóða stríði, var í vinardystinum ímóti Hollandi í síðstu viku. Holland vann 3-0, men hetta hevur eftir øllum at døma ikki givið Hollandi størri tyngd í FIFA høpi. Holland hevur leingi verið á fjórða plássinum. Síðani í mai hevur FIFA flutt Holland aftur á sætta plássið. Tað man ivaleyst komast av tapunum á heimavølli ímóti Belgia og Írlandi.

Latínamerika og Europa eru framvegis teir partarnir av heiminum, har bestu landsliðini eru. Brasil er nummar eitt, Frakland er næstovast, so koma Spania og Meksiko, og so er Argentina frammanfyri Holland. Besta asiatiska landið er Turkaland, sum er á sjeynda plássinum. Turkaland verður í fótbóltshøpi roknað at hoyra til Europa. Teir luttaka bæði í Europa Cup og í EM og HM undankappingum í UEFA høpi.

Danmark verður roknað at eiga besta landsliðið í Norðurlondum. Einki serligu úrslitini í síðstu fyrireikingardystunum undan fráferðini til Portugal hava tó kostað hjá Danmark, sum síðsta mánaðin er flutt eitt pláss aftur og nú er nummar fimtan.

Svøríki er flutt trý pláss fram, eftir at teir hava staðið seg væl í vinardystunum. Svøríki er nú nummar átjan. Noreg er nummar 36 og Finnland er nummar 42. Tað svíður rættuliga nógv hjá Íslandi, at teir taptu 6–1 á útivølli ímóti Onglandi.

Tað eru 205 fótbóltstjóðir á listanum, og Montserrat er á aftasta plássinum. Tað er lítið oyggjaland í Karibiska havinum, har fólkatalið liggur um tólv túsund.





**Pakkaferðir til London**

**Fráferðir eru 11., - 18. og 25. juli**

**Fyri hvønn í tveymanskamari í 1 viku**

**6.985,-**

**Einakamar: Kr. 8.650,-**

Gist verður á fralíka 3★★★ Queen Park Hotel í Bayswater. Ikki langt frá Hyde Park og Oxford Street. Vælkendi Portobello Road leygardags-marknaðurin í Notting Hill Gate er bert fáar minuttir til gongu frá hotellinum.

www.queensparkhotel.com

**Íroknað ferðina er:**
Flúgving við Atlantic Airways Vagar - Stansted og aftur • Flutningur frá Stansted við bussi og aftur. Við hjálparfólki á staðnum • Gisting í 7 nætur á Queens Park Hotel við morgunmati • Halvdags útferð: London City Tour við skandinavisk-um ferðaleiðara • Hálvdagsútferð: Hampton Court Palace & Gardens við skandinaviskum ferðaleiðara • Ein av kendu West-End songleikunum, mánadag ella týsdag við flutningi til/frá hotellinum og skandinaviskum ferðaleiðara.

Ferðatrygging er ikki íroknað prísin.

**Fortreytin fyri ferðini er, at í minsta lagi 15 fólk tekna seg.**

Vanligir ferðaseðlar kunnu bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SANSIR 355 355





NORÐURLANDAHÚSIÐ **TILTØK APRÍL 2004**

**SKRÁIN VIKA 24–25**

**Fríggjadagur 11. juni**
**Kl. 19.30** **Konsert v/GHM (FO) og Odense Senior Blæsere (DK)**

**Mánadagur 14. juni**
**Kl. 18.45** **Nordisk Søforsikring (DK),** fundur

**Mikudagur 16. juni**
**Kl. 19.30** **Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag (FO),** almennur panelfundur

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo**




# Startrøðin til eystanstevnu

Eftir at norðoystevnuróðurin er av, er tað framyvir soleiðis, at plaseringarnar á seinasta róðrinum gera av, hvussu startast skal á komandi róðrinum. Hetta soleiðis at teir bátar, sum endaðu fremstir seinast, hava mittastu startnummarini á komandi róðrinum.

Startrøðin á eystanstevnu verður sostatt sum víst niðanfyri.

**-jm**



*Nú er greitt, hvussu startrøðin verður á eystanstevnu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Fimmmannafør, dreingir**
1 Svanur
2 Tjaldrið
3 Royndin Fríða
4 Tekla
5 Havfrúgvin
6 Blikkur
7 Spógvin
8 Fípan Fagra
9 Sílið
10 Firvaldur
11 Báran
12 Kollur
13 Drekin

**Seksmannafør, kvinnur**
1 Sølmundnur
2 Víkingur
3 Páll Fangi
4 Jarnbardur
5 Lómur
6 Gongurólvur
7 Sundabáturin

**Fimmmannafør, gentur**
1 Tekla
2 Hvassi
3 Tjaldrið
4 Junkarin
5 Frúgvin
6 Firvaldur
7 Havfrúgvin
8 Sílið
9 Blikur
10 Fípan Fagra
11 Ørnin
12 Drekin
13 Falkur
14 Spógvin

**Seksmannafør, menn**
1 Sandingur
2 Hvessingur
3 Lómur
4 Jarnbardur
5 Gongurólvur
6 Sundabáturin
7 Strálan
8 Víkingur
9 Sølmundur
10 Hósvíkingur

**Áttamannafør**
1 Ørvur
2 Nevið Reyða
3 Argjabáturin
4 Kvívíkingur
5 Knørrur

**Tíggjumannafør**
1 Hoyvíkingur
2 Vágbingur
3 Nólsoyingurin
4 Havnarbáturin
5 Vestmenningur
6 Eysturoyingur

# 100 ára kapping hjá KÍ

**Sum partur av føðingardegnum skipar KÍ í summar fyri stórari kapping fyri allar yngru deildir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍ hevur í hesum døgum sent fótbóltsfeløgunum kring landið innbjóðing til 100 ára kapping.

Talan verður um kapping fyri yngru liðini kring landið, og umframt at KÍ á hendan hátt enn einaferð markerar runda dagin, so er hetta ivaleyst eisini eitt kærkomið høvi hjá ymsu feløgunum at fáa gongd á dystarvenjingina eftir summarfrítíðina.

Kappingin er nevnliga sett at verða hildin um vikuskiftið, 6.-8. august, og er seinasti parturin av hesari sjálvsagt finalurnar, sum skulu spælast í Klaksvík. Tað verða hálvfinalurnar eisini, men undan hesum skal finnast fram til, hvørji fýra feløg skulu hava umboð í hálvfinalunum.

Dystirnir, sum skulu avgera hetta seinasta, verða ikki leiktir í Klaksvík, men verður talan tá um dystir eftir cup-skipanini. Sjálvandi veldst talið á hesum um talið av luttakandi feløgum, men ætlanin er so, at mótstøðuliðini her verða sett landafrøðiliga saman, soleiðis at ferðingin verður sum minst hjá øllum pørtum. Tað vil við orðum siga, at tað ikki fer at verða soleiðis, at TB og KÍ hittast í eini fjórðingsfinalu, meðan LÍF og VB hittast í eini aðrari. Men heldur soleiðis at TB og VB leika sínamillum, eins og KÍ og LÍF gera tað.

Á harrasíðuni verður kappast í bólkunum frá smápiltum upp til dreingir, og hjá gentum eru tað bólkarnir frá pinkum upp til gentur, sum eru boðin at taka lut í kappingini.

KÍ sigur at enda í innbjóðingini, at seinasta freist at boða frá luttøku er mikudagin, 16. juni.

# Íslendska fótbólturin líkist sær sjálvum

**Julian og teir taptu tepurt í Reykjavík, har KR fekk sigursmálið við brotssparki, og nú er meistaraliðið omanfyri miðjuna**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Málini eru oftast ikki mong í íslendsku landskappingini. Mest vanliga úrslitið man vera 1–0 og 1–1. Í 25 teimum fyrstu dystunum eru skorað 54 mál ella eitt sindur meiri enn tvey í miðal.

Mikukvøldið fóru Julian Johnsson og liðfelagarnir í ÍA gjøgnum undirsjóvartunnilin undir Hvalfirði. Ørindini vóru at vitja í vesturbýnum í Reykjavík, har Knattspyrnufelag Reykjavíkar ella KR, sum tað oftast verður nevnt, tók ímóti.

Longu í fjórða minutti varð einasta málið skorað. KR fekk brotsspark, sum teir fingu fulla nyttu burturúr. So løgdu teir størsta dentin á at verja leiðsluna, og tað eydnaðist teimum.

Tað hevur altíð verið soleiðis í íslendskum fótbólti, at nógv tey flestu málini verða skorað eftir deyðbóltsstøður. Likamliga styrkin hevur nógv at siga, tá ið tað verður dystast eftir langar sendingar, og skjótleikin er ofta avgerandi, tá ið tað ræður um at vera fyrstur á returbóltunum.

Við sigrinum á ÍA lyftu meistararnir í KR sær fram á fimta plássið. ÍA er eftir fimm tey fyrstu umførini á triðja plássinum. Fram, sum Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen spæla við, er í áttanda og triði niðasta sætinum. Tað eru seks stig frá Fram og fram til Fylkir, sum er á odda við ellivu stigum.

16. juni skal ÍA spæla á heimavølli ímóti FH, og Fram fær vitjan av KA av Akureyri, sum eftir fimm tey fyrstu umførini er næstniðast.

## Íslendska Landsbankadeildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fylkir | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 7 | 2 | 5 | 11 |
| 2 Keflavík | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 7 | 5 | 2 | 10 |
| 3 ÍA | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 8 |
| 4 FH | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 5 | 4 | 1 | 8 |
| 5 KR | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 7 |
| 6 ÍBV | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 6 | 6 | 0 | 6 |
| 7 Grindavík | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 5 | 6 | -1 | 6 |
| 8 Fram | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 7 | 7 | 0 | 5 |
| 9 KA | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 4 | 6 | -2 | 4 |
| 10 Víkingur R | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 2 | 8 | -6 | 1 |

Før. leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)

## EM-KAPPINGIN

| 1. UMFAR | | | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|---|---|
| Portugal-Grikkaland | Bólkur A: | 12. juni kl. 17.00 | | | |
| Spania-Russland | Bólkur A: | 12. juni kl. 19.45 | | | |
| Sveis-Kroatia | Bólkur B: | 13. juni kl. 17.00 | | | |
| Frakland-Ongland | Bólkur B: | 13. juni kl. 19.45 | | | |
| Danmark-Italia | Bólkur C: | 14. juni kl. 17.00 | | | |
| Svøríki-Bulgaria | Bólkur C: | 14. juni kl. 19.45 | | | |
| Kekkia-Letland | Bólkur D: | 15. juni kl. 17.00 | | | |
| Týskland-Holland | Bólkur D: | 15. juni kl. 19.45 | | | |
| Grikkaland-Spania | Bólkur A: | 16. juni kl. 17.00 | | | |
| Russland-Portugal | Bólkur A: | 16. juni kl. 19.45 | | | |
| Ongland-Sveis | Bólkur B: | 17. juni kl. 17.00 | | | |
| Kroatia-Frakland | Bólkur B: | 17. juni kl. 19.45 | | | |

At senda til: EM-spælið, postsmoga 3341, FO-110 Tórshavn
Seðilin kann eisini latast inn hjá Kiosk Steinatún í Havn.
Seðilin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin, 12. juni

Fornavn ______________________

Eftirnavn ______________________

Føðingardagur ______________________

Lið nr: ______________________

Bústaður ______________________

Postnr. og staður ______________________

Sosialurin — Kiosk Steinatún